LM-092/2025

# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24.04.2026 |
| Mál nr.: | 26/01273 |
| Málsviðgjørt: | SPE/MJ |
| Ummælistíð: | 21.01.2026-04.02.2026 |
| Eftirkannað: | 22.04.206 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almennu talgildu postskipanina Mínboks**
(Føroya Rættur fær heimild at senda og kunnuggera talgilt umvegis Mínboks)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2023 um almennu talgildu postskipanina Mínboks verður aftan á § 3 sett:

“**§ 3 a.** Føroya Rættur kann senda kunnuggering umvegis Mínboks við tí rættarvirknaði sum fylgir av rættargangslógini §§ 202 og 203.

*Stk. 2.* Føroya Rættur kann vegna Eystara Landsrætt og Hægstarætt senda kunnuggering umvegis Mínboks við tí rættarvirknaði sum fylgir av §§ 202 og 203 í rættargangslógini, í málum sum Eystari Landsrættur og Hægstirættur viðgera.”

**§ 2**

Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð, nær løgtingslógin kemur í gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið snýr seg um at tryggja, at Føroya Rættur kann senda "digital forkyndelse" (talgilda kunnuggering) umvegis Mínboks.

Føroya Rættur er í holt við at tillaga sítt virksemi til talgild viðurskifti, undir hesum eisini at knýta seg í Mínboks.

Í hesum sambandi er neyðugt at gera tillagingar í løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2023 um almennu talgildu postskipanina Mínboks, soleiðis at Føroya Rættur kann senda talgilda kunnuggering umvegis Mínboks.

Kunnuggering er ikki fevnd av lógini um Mínboks, og fyri at kunna senda brøv av slíkum slag umvegis Mínboks, krevst ein greið heimild.

Borgarar, sum ikki hava Mínboks, ella hava givið avvarandi fulltrú til sína Mínboks, fara framhaldandi at fáa kunnuggering eftir núverandi mannagongdum, eitt nú við vanligum posti.

*Hvat er kunnuggering*
Kunnuggering fevnir um týdningarmikil boð, ið ein persónur, sum er partur av einum rættarmáli, verður gjørdur kunnigur við frá rættinum, t.d. ein stevning, innkalling, dómur ella onnur rættarlig boð. Sendarin av kunnuggeringini móttekur eina váttan um, at móttakarin hevur móttikið kunngeringina.

Kunnuggering kann ikki samanberast við vanliga postútbering. Við kunnuggering er tað ikki nóg mikið, at brævið er komið fram til móttakaran. Tað skal vera komið móttakaranum til kunnleika (t.e. opnað ella viðgjørt), og hetta skal kunna váttast av sendaranum. Tað er tí tørvur á at víðka virkisøkið hjá Mínboks tilsvarandi.

*Talgild Kunngering og Føroya Rættur*
Kunnuggering er ásett í rættargangslógini fyri Føroyar kapittul 25 um boð og kunnuggering av boðum. Talgild kunnuggering er ítøkiliga løgskipað í ásetingunum § 198, stk. 1, nr. 4 og 6, § 199, stk. 1 nr. 5 og 6, § 199, stk. 2, 2. pkt, §§ 202 og 203 saman við § 205, stk. 3. Ásetingarnar eru tó ikki virknar, fyrr enn danski løgmálaráðharrin setur tær í gildi. Tað er ein fortreyt, at ásetingarnar í rættargangslógini um talgilda kunnuggering verða settar í gildi av danska løgmálaráðharranum samstundis sum henda broyting í løgtingslógini um Mínboks kemur í gildi.

Føroya Rættur ynskir, at tað er týðiligt ásett av føroyskum myndugleikum, at kunnuggering kann sendast umvegis Mínboks. Bæði tí at Mínboks er føroyskt málsøki og fyri at tryggja, at spurnartekin ikki verður sett við heimildina av at senda kunnuggering umvegis Mínboks.

Danmarks Domstole senda kunnuggering sum talgildan post umvegis donsku talgildu postskipanina.

Uppskotið hevur við sær, at Føroya Rættur kann samskifta talgilt við føroyskar borgarar og feløg o.l. (løgfrøðiligar persónar).

Uppskotið viðførir eisini, at Føroya Rættur kann veita Eystara Landsrætti og Hægstarætti (praktiska) hjálp við at senda kunnuggering umvegis Mínboks í málum, sum verða viðgjørd við Eystara Landsrætti og Hægstarætti.

*Kt-tillagingar*
Kt-tekniskt tillagast Mínboks, so sendarin fær váttan um, at móttakarin hevur kunnleika um kunnuggeringina. Talgildu Føroyar hava arbeitt tætt saman við Center for IT hjá Domstolsstyrelsen, fyri at tryggja at skipanin livir upp til nøktandi krøv. Søren Truelsen, kt-verkætlanarleiðari, upplýsir: *"Samtidig er løsningen i Minboks en moderne og sikker løsning, der it-mæssigt lever op til alle sikkerhedskrav fra både de færøske myndigheder og de krav Domstolsstyrelsen i Danmark stiller til domstolenes informationssikkerhed og databeskyttelse"*

## 1.2. Galdandi lóggáva

Í dag er bert heimild til at senda vanligan post umvegis Mínboks. Ongin heimild er í galdandi lóg, sum loyvir at senda kunnuggering send umvegis Mínboks.

Sum støðan er í dag, kann kunnuggering fremjast sambært rættargangslógini § 199, stk. 1, punkt 1-4.
Sambært rættargangslógini § 199 kann kunnuggering fremjast á ein av hesum háttum:

1. Boðini o.a. verða send ella latin viðkomandi, sum samstundis verður biðin um at vátta móttøkuna á einum avriti av skjalinum ella, um kunngeringin fer fram eftir fyriskipan hjá rættinum ella ákæruvaldinum, á einum serligum móttøkuskjali (bræv-kunngering).
2. Boðini o.a. verða send viðkomandi í brævi við móttøkukvittan (post-kunngering).
3. Boðini o.a. verða latin viðkomandi av einum stevningarmanni ella øðrum, ið hevur heimild til tess, sbrt. §§ 90 og 91 (stevningarmanna-kunngering).
4. Boðini o.a. verða givin telefoniskt til viðkomandi, sum frammanundan ella aftaná fær skjalið sent ella handað og síðani fær senda eina váttan um kunngerðina (telefon-kunngerðing).

Føroya Rættur vísir á, at kunnuggering við brævi (nr. 1) er í praksis óhóskandi, tí hon er treytað av, at móttakarin sendir eina váttan aftur til rættin. Telefon-kunnuggering (nr. 4) er treytað av, at rætturin hevur telefonnummarið hjá móttakaranum, sum í flestu málum ikki er støðan.

Rætturin í Føroyum nýtir í høvuðsheitum kunnuggering við vanligum posti (nr. 2). Stevningarmanna-kunnuggering (nr. 3) verður bert nýtt til politi-stevning, sum er tilskilað í serligum førum, til dømis tá tað er neyðugt at leita eftir móttakaranum. Rætturin hevur ongar fastsettar stevningarmenn.

Kunnuggering við posti og kunnuggering við stevningarmanna eru bæði tíðar- og arbeiðskrevjandi. Kunnuggering gjøgnum Posta við móttøkukvittan er dýr og seinfør. Postboðini arbeiða vanliga millum kl. 8 og kl. 16, tá móttakarin ofta er til arbeiðis, og í mongum førum mugu fleiri royndir gerast, áðrenn kunnuggeringin eydnast. Ofta fer kunnuggeringin ikki fram fyri móttakaran sjálvan, men fyri eitt húsfólk á bústaðnum, sum javnan førir til misskiljingar og í seinasta enda útseting av rættarmálunum.

Sein og óeffektiv kunnuggering er við til at seinka rættarmálini og hevur við sær longri málsviðgerðartíðir.

Møguleikarnir sum rætturin hevur í dag til kunnuggering eru, sum nevnt, treytaðir av, at móttakarin (ella eitt húsfólk á bústaðnum) sum útgangsstøði verður kontaktaður á bústaðnum ella arbeiðsplássinum. Tað eru nógvir móttakarar, helst m.a. orsakað av teimum smáu viðurskiftunum í Føroyum, sum halda hetta vera óneyðuga eyðmýkjandi, serliga tá talan er um revsimál. Eisini eru brúkarar hjá rættinum sum halda kunnuggering vera ótíðarhóskandi, og at borgarar hava trupult við at skilja, hví rætturin ikki kann nýta tær talgildu samskiftisformar, sum borgararnir annars eru vanir við at brúka í samskifti sínum við almennar myndugleikar.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Føroya Rættur ynskir, at tað verður týðiligt ásett av føroyskum myndugleikum, at kunnuggering kann sendast umvegis Mínboks. Bæði tí at Mínboks er føroyskt málsøki og fyri at tryggja, at spurnartekin ikki verður sett við heimildina av kunnuggeringini umvegis Mínboks.

Við talgildari kunnuggering umvegis Mínboks fæst ein skjót, effektiv og beinleiðis handan av teimum boðum frá Føroya Rætti, ið skulu kunngerast, soleiðis at tað slepst undan, at kunngerarhátturin hevur við sær seinkan av rættarmálum og longri málsviðgerðartíðir. Talgild kunnuggering í Mínboks er samstundis privat og diskret og livir upp til væntanir og krøv borgaranna í einum nútímans samskiftissamfelagi.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Broytingin snýr seg um at tryggja, at Føroya Rættur fær heimild at senda kunnuggering umvegis Mínboks, so ein persónur, sum er partur av einum rættarmáli, talgilt verður gjørdur kunnigur við, t.d. eina stevning, innkalling, dóm ella onnur rættarlig boð.

Við uppskotinum gerst tað møguligt hjá Føroya Rætti at senda kunngering elektroniskt umvegis Mínboks.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent til hoyringar hjá:

Sorinskrivarinum
Løgmansskrivstovan
Fróðskaparsetur Føroya
Føroya Politi
Ríkisumboðnum í Føroyum
Kriminalforsorgin
Almannaverkið

**Ummælissvar:**

*Sorinskrivarin*

Sorinskrivarin greiðir frá hvussu kunnuggering verður framd í dag og hvørjar avbjóðingar eru við hesum kunngeringarháttum, sum kunnu seinka rættarmálum og leingja málsviðgerðartíðir. Talgild kunnuggering kann bøta um hesi viðurskifti. Føroya Rættur ynskir, at tað er ásett av føroysku myndugleikunum, at talgild kunnuggering kann sendast umvegis Mínboks. Bæði tí at Mínboks er føroyskt málsøki og fyri at tryggja, at spurnatekin ikki verður sett við heimildina av kunngeringini umvegis Mínboks.

Viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar.

*Domstolsstyrelsen*

Kt verkætlanarleiðari frá Center for IT í Danska Domstolsstyrelsen vísir á, hvussu kunnuggering í dag er ótíðarhóskandi, og hvussu talgild kunnuggering kann bøta um hetta. Víst verður á, at loysnin í Mínboks er ein trygg og nútíðarhóskandi loysn, sum livir upp til neyðugu trygdarkrøv, sum Domstolstyrelsen setir til kt- og dátutrygd.

Viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar.

*Justitsministeriet*

Danska Justitsministeriet hevur viðmerkingar til ávísar viðkomandi greinar í rættargangslógini, sum umfata talgilda kunngering.

Danska Justitsministeriet biður um, at tað verður viðmerkt, at tað er ein fortreyt, at ásetingarnar í føroysku rættargangslógini um "digital forkyndelse" verða settar í gildi samstundis broytingin í lógini um Mínboks kemur í gildi.

Viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar.

*Dátaeftirlitið*

Dátueftirlitið greiðir í hoyringssvarinum frá, at sum tey áður hava vísir á, at í einum hoyringssvari til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (LM-052/2025), so eru ríkismyndugleikarnir í Føroyum hvørki fevndir av dátuverndarlógini ella av ES-fyriskipanini um dátuvernd (GDPR).
Dátueftirlitið er av tí fatan, at hetta hevur við sær, at ríkismyndugleikarnir eru at rokna sum triðjalond í dátuverndarhøpi, og av tí at ríkismyndugleikarnir ikki eru á listanum yvir lond við nøktandi verndarstøði, so er talan um somu støðu sum um talan var um eitt ótrygt triðjaland. Tað vil siga, at flutningur av upplýsingum til ríkismyndugleikarnar tí formliga eigur at lúka reglurnar um triðjalandsflutning í § 61 ella § 62 í dátuverndarlógini.

Tá Dátueftirlitið gjørdi táverandi Løgmálaráðið varugt við trupulleikan bleiv avgjørt, at fara undir eina tilgongd at góðkenna ríkismyndugleikarnar, og leggja teir afturat listanum yvir lond við nøktandi verndarstøði. Løgmansskrivstovan arbeiðir enn við hesum, og samskiftir javnan við Dátueftirlitið í hesum sambandi.

Fíggjarmálaráðið hevur fingið upplýst frá Løgmansskrivstovuni at mann samskiftir við danskar myndugleikar um at fáa hesi viðurskiftini í rættlag.

*Ríkisumboðið*

Lógarbroytingin viðvíkur ikki virkseminum hjá Ríkisumboðnum. Tey høvdu tí onga viðmerking til tann partin.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Ongar fíggjarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur. Mett verður, at broytingin hevur jaliga fíggjarliga avleiðingar fyri ávísar ríkismyndugleikarnar. Føroya Rættur fær eina beinleiðis sparing við at sleppa undan at rinda postgjald, tá kunngeringin verður send við pappírsposti. Óbeinleiðis sparing fæst við, at løgreglan í ávísum føri sleppir undan at koyra út at kunnuggera, og Føroya Rættur sleppur frá at handfara pappírsbrøv (t.e. prenta, pakka, senda, v.m.).
Fíggjarligar útreiðslur at menna Mínboks, so sendarin fær váttan um, at móttakarin hevur kunnleika um kunngeringina, eru smáar og verða hildnar innan fyri rakstrarútreiðslunar hjá Talgildu Føroyum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur avleiðingar eru fyri Posta, tí kunngering umvegis Mínboks kemur ístaðin fyri postútbering.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar eru fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar. Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar
Tað eru ongar kendar markaforðngar á økinum.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv. Lógaruppskotið loyvir einans kunnuggering umvegis Mínboks. Kunnuggeringin sjálv er heimilað í rættargangslógini.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skyldur fyri likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið hevur ongar heimildir til landstýrisfólk, stovnar undir landstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið hevur gevur ongum almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ongar aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

Ásetingin gevur Føroya Rætti heimild at senda kunnuggering (digital forkyndelse) umvegis Mínboks við tí rættarvirknaði sum fylgir av rættargangslógini §§ 202 og 203, tað vil siga at brævið ikki bara er komið fram til móttakaran, men er komið til kunnleika hjá móttakarinum. Kunngering fevnir um týdningarmikil boð, ið ein persónur, sum er partur av einum rættarmáli, verður gjørdur kunnigur við frá rættinum, t.d. ein stevning, innkalling, dómur ella onnur rættarlig boð. Sendarin av kunnuggeringini móttekur eina váttan um, at móttakarin hevur móttikið kunnuggeringina.

Kunnuggering kann ikki samanberast við vanliga postútbering. Við kunnuggering er tað ikki nóg mikið, at brævið er komið fram til móttakaran. Tað skal vera komið móttakaranum til kunnleika (t.e. opnað ella viðgjørt), og hetta skal kunna váttast av sendaranum.

Føroya Rættur fær eisini heimild til, vegna Eystara Landsrætt og Hægstarætt, at senda kunnuggering umvegis Mínboks við tí rættarvirknaði sum fylgir av §§ 202 og 203 í rættargangslógini, í málum sum Eystari Landsrættur og Hægstirættur viðgera.

**Til § 2**

Kunnuggering er ásett í rættargangslógini fyri Føroyar kapittul 25 um boð og kunnuggering av boðum. Talgild kunnuggering er ítøkiliga løgskipað í ásetingunum § 198, stk. 1, nr. 4 og 6, § 199, stk. 1 nr. 5 og 6, § 199, stk. 2, 2. pkt, §§ 202 og 203 saman við § 205, stk. 3. Ásetingarnar eru tó ikki virknar, fyrr enn danski løgmálaráðharrin setur tær í gildi.

Tað er ein fortreyt, at ásetingarnar í rættargangslógini um talgilda kunnuggering verða settar í gildi av danska løgmálaráðharranum samstundis sum broyting í løgtingslógini um Mínboks kemur í gildi. Tí verður ásett, at landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð, nær løgtingslógin kemur í gildi.

Fíggjarmálaráðið, 24. apríl 2026

Aksel V. Johannesen<br>landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Notat frá Sorinskrivarinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Justitsministeriet
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá domstolsstyrelsen
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Dátaeftirlitinum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Føroya Politi
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá  Ríkisumboðnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Almannaverkinum